## DAGSINS MEINING

# Føroysk olja?

Tað vóru kærkomin tíðindi, sum vórðu almannakunngjørd í farnu viku, tá stóra amerikanska oljufelagið ChevronTexaco, boðaði frá einum stórum oljufundi skamt frá føroyska markinum, í bretskum øki. Hóast óváttað tíðindi hava gingið um hetta oljufundið, so var gott at fáa hetta staðfest. Tí hetta gevur okkum vónir um, at møguleikar at finna olju her hjá okkum eru til steðar. Tað kemur eisini sera væl við, júst nú tá okkara myndugleikar eru farnir undir at viðgera umsóknirnar til oljuleiting í 2. útbjóðing. Ein kann sjálvandi siga, at tað hevði nú verið betri, um upplýst hevði verið um hetta fundið, áðrenn útbjóðingin lat aftur. Tí so hevði verið hugsandi, at kanska uppaftur fleiri feløg høvdu verið við.

Men tað er so farið. Lat okkum heldur fegnast um, at eitt stórt fund er gjørt so tætt upp at okkara egna landgrunni. Og hvør veit, kanska er her talan um eina keldu, sum gongur inn á føroyskt øki. Undirgrundin kennir jú ikki til politisk mørk. Um so er, og tað fæst at vita næsta ár ella árið eftir, tá nakrir avmarkingarbrunnar eru boraðir, so kann man siga, at føroyska oljuøldin í veruleikanum byrjaði, tá ChevronTexaco, Statoil, Dong og OMV boraðu niður á 3600 metra dýpri 9 fjóðringar frá føroyska landgrunninum í august mánað 2004 og raktu við olju og gass. Spurningurin er so bara, hvussu langt vestureftir henda kelda røkkur.

Tað er tó rætt ikki at selja skinnið fyrr enn bjørnin er skotin. Tvs. at vit mugu vera varin við ikki at gera ov skjótar niðurstøður. Hetta er ein lærdómur, sum vit eiga at læra frá teimum fyrstu fýra brunnunum í 1. útbjóðing. Tá vóru vónirnar, her serstakliga hjá bretska oljufelagnum BP, sera bjartskygdar. Táverandi leitistórin kendi seg rættiliga vísan í, at eitt fund fór at vera gjørt, men so varð ikki. Í dag roynir sama felag, sum tá legði alt í eina kurv og fekk tað tá "besta" loyvið í "Gullhorninum" at finna heilt onnur umráði á landgrunninum at bora í. So skjótt kunnu tingini broytast í oljuleiting.

Sjálvandi kundi verið spurt nú, um ikki sami vandi er til steðar longur norðari, har olja nú er staðfest í bretskum øki. Tí tað var nettup út frá staðfestum oljufundum í bretskum øki har suðuri, at oljufeløgini mettu møguleikan fyri at gera fund í líknandi jarðfrøði í føroyskum øki, at vera góðan. Ein kolvetnisskipan var so staðfest. Men feløgini hava ikki somu vónir til tað økið í dag.

At olja og gass nú verða funnin longur norðuri og heilt upp at markinum og tað í einum øki, sum okkara myndugleikar hava boðið út í 2. útbjóðing, kann vera kærkomið. Ikki minst tí, at somu feløgini, sum hava gjørt fundið í bretskum øki, øll hava boðið uppá teigar beint hinumegin markið. Hóast feløgini hava kunngjørt, at tey hava gjørt eitt fund, so er ikki vist, um tey harvið hava latið út allar upplýsingar. At tey søkja um øki við Føroyar og tað í nánd av nýggjasta oljufundinum, kundi bent á, at tey hava vitan og eina positiva metan av føroyska økinum.

Ein áhugaverd tíð stendur fyri framman. Føroyska samfelagið hevur brúk fyri góðum tíðindum sum hesum, nú tað vísir seg at ganga niður á bakka á so mongum økjum. Eitt fund sum hetta – hóast tað enn ikki er fullgreitt, um talan verður um eina framtíðar framleiðslu, fær altjóða oljuheimin at seta ljóskastaran á aftur hetta økið.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Koyr bara - ongin rokning verður send!

**Petur E. Nielsen,**
*Sandavágur*

Hetta vóru gleðiboðini, sum P/F Vágatunnilin kunngjørdi m. a. á heimasíðuni tann 10. december 2004, tá Vágatunnilin fylti 2 ár.

Hóast hetta er tíðin við jólamonnum og gávum, hevði eg kortini ilt við at trúgva, at nevndin í P/F Vágatunnlinum veruliga vildu loyva "kubba-trælunum", herundir eisini okkum pendlarum, at koyra eina einastu ferð ókeypis ígjøgnum Vágatunnilin - serliga tá hugsað verður um, at hetta er fyrstu ferð, vit høvdu møguleikan at koyra ókeypis ein arbeiðsdag og ikki ein leygardag!

Og hetta tóktist eisini vera galdandi á 2 ára føðingardegnum, tá allar Føroyar annars vórðu bodnar ókeypis til Vágarnar at skoða apurnar, sum hava verið so tollutar at fingið sær hálsband, sum eyðmerkir tær frá hinum, sum ferðast inn og út úr apubúrinum.

Tá eg fríggjadagin tann 10. december 2004 kl. 08.05 fór ígjøgnum Vágatunnilin á veg til arbeiðis, legði eg til merkis, at svartir plastposar vóru smoygdir útyvir gjalds-skeltini, og at nýggj skelti vóru sett upp sum søgdu »Ókeypis koyring - free passing«.

Fyri rættuliga at njóta hesa stóru løtuna, tá ein pendlari - ein arbeiðsdag - heilt ókeypis kundi koyra ígjøgnum holið, setti eg ferðina niður á 20 og hevði hug at tríva í ein jólasálm.

Men gakk - grøna ljósið lýsti sum vanligt, tá eg fór framvið gjaldsstøðini sum tekin um, at eitt klipp varð trekt av mínum 40-túra kubba.

Við samanbitnum tonnum koyrdi eg til arbeiðis og ringdi síðani til Vágatunnilin og spurdi, hvussu ein bilur við kubba kundi tryggjað sær, at tað ikki varð tikið eitt klipp av kubbanum hendan dagin. Fólki hjá Vágatunnlinum svaraði fryntliga, at tey snøgt sagt høvdu sløkt skipanina. Eg spurdi síðani, um eg á nakran hátt kundi síggja, at skipanin var sløkt, og tá varð sjálvsagda svarið, at onki lýsti, tá koyrt varð ígjøgnum. Eg bað so upp á forhond orsaka mítt orðaval og spurdi, hví tað so lýsti grønt hjá mær, tá eg koyrdi ígjøgnum fyri einum hálvum tíma síðani. Nú var tøgn eina løtu í hinum endanum - spurt varð, hvat nummarplátu bilurin hjá mær hevði og hvat telefonnummar eg hevði, so tey kundu kanna málið og venda aftur til mín.

Nakrar tímar seinni fekk eg teldupost frá Vágatunnlinum við hesum orðaljóði: »Sambært telefonsamrøðu okkara í morgun skal eg siga frá, at skipanin er sligin frá. Vit hava boðað frá, at tað er frítt at koyra 10.12.2004 og tað er tað fyri øll."

P/F Vágatunnlinum líkt varð svarað í eyst tá spurt varð í vest, so eg spurdi aftur, um orsøkin til, at tað lýsti grønt hjá mær var, at skipanin ikki varð sløkt fyrr enn eftir kl. 08.05, ella um tað í veruleikanum varð trekt eitt klipp av kubbanum, sum síðani skuldi góðskrivast mær í kubbahaldinum.

P/F Vágatunnlinum mátti so viðganga, at innkrevjingarskipanin kortini ikki var sløkt, men at hon varð sett í »free-modus« sum merkir, at allir túrar verða skrásettir, men fyri prís kr. 0,00. MEN, segði Vágatunnilin - og haldi tykkum nú fast - at »skipanin inn ímillum byrjar at krevja aftur av sær sjálvari. At mín kubbi lýsti grønt merkti sostatt, at skipanin var farin í sjálvdrátt og hevði tikið eitt klipp av kubbanum (hon kundi ivaleyst ikki bara sær, tá hon sá ein troystaríkan og smílandi pendlara koma fram við!).

P/F Vágatunnilin segði seg vilja gjøgnumganga allar kubbarnar, sum hava koyrt ígjøgnum tunnilin tann 10.12.2004 fyri at bóka »føðingardags-klippið« inn aftur á kubban.

Nú skuldi ein trúð, at mistakið var rættað og jólafriðurin tryggjaður, men øll við kubba vita tó av beiskum royndum, at tað er svartasta ómøguligt at fylgja við, um faktureringin hjá Vágatunnlinum samsvarar við talið av koyrdum túrum, tí felagið er snøgt sagt ikki ført fyri at fylgja við hesum, hóast tað upprunaliga varð lagt upp til, ein ferðandi altíð kundi biðja um útgreining av koyrdum túrum.

Tað er ein sannroynd, at fleri av teimum uttan kubba hava fingið ókeypis túrar, tí vanliga innkrevjingarskipanin ongantíð fekst at rigga. Við kubba-skipanini er eftir øllum at døma beint øvugt - hon vil ikki akta P/F Vágatunnilin, sjálvt tá felagið hevur føðingardag, men krevur pengar inn, tá tað passar henni!

Var tað ikki fyri pendlarum - og hinum, sum hava verið so kúbýtt at keypa sær ein kubba - so hevði Vágatunnilin heldur ikki fingið 27 av teimum 32 mió í inntøkum, sum av røttum áttu at komið í kassan, um hugt verður eftir veruliga talinum av bilum, sum hava ferðast ígjøgnum tunnilin í 2003.

Sannleikin er nevniliga tann, at ferðandi við kubba - t. v. s. serstakliga vit vágafólk og onnur sum nýta tunnilin nógv - eru tey einastu, sum P/F Vágatunnilin hevur kunnað kravt hvørt tað einasta oyra í bummgjaldi frá!

Til fyrimuns fyri P/F Vágatunnilin skal tó kortini sigast, at ikki kann væntast nógv skil av einum 2 ára gomlum føðingardagsbarni.

Tillukku við degnum og gleðilig jól!

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.